# Autumn '09






Hendan samansetingin var best umtókt á polyvore.com í síðstu viku.

## Skapa tín persónliga stíl




Framyvir mugu rákfrøðingar og mótahús venja seg við, at brúkarin sjálvur í nógv størri mun finnur, blandar og skapar síni egnu mótarák. Hetta sigur samskiftisserfrøðingurin Bjarke Svendsen frá Retail Institute Scandinavia, og vísir til heimasíður sum til dømis polyvore.com.

Har kanst tú surfa runt millum fleiri milliónir klædnavørur, skógvar og tilhoyr og samanseta tíni egnu sett tvørtur um heimskendu merkini – líka frá H&M til Chanel.

– Slíkar internetcommunities kunnu hjálpa fólki at skapa ein persónligan stíl og egið snið, sum so aftur skapar trend í gøtumyndini, sigur samskiftiss erfrøðingurin.



## HÁRIÐ Í HEYST OG Í VETUR

Klipp klipp klipp – heilt stutt klipt hár er hot

Pagan heldur enn – bæði stutt og síð

Eins og í vár, skal hárið í heyst og í vetur vera silvurhvítt, sum hjá Kate Moss

VOLUME – letur tú hárið vaksa, skal tað fylla NÓGV

Neytakonuflættan er framvegis at síggja í mótamyndini

